GREINING

DANMARKS NATIONALBANK

16. DESEMBUR 2020 — NR. 29

FØROYSKUR BÚSKAPUR

# Hákonjunktururin í Føroyum minkandi

**Trýst á arbeiðsmarksnaðinum hóast lægri vøkstur**

Arbeiðsvirkni í Føroyum er høgt, arbeiðsloysi sera lágt, og ein partur av búskapinum tørvar arbeiðsmegi. Útflutningurin er hinvegin minkaður í ár, og hákonjunktururin hevur nátt tindunum á hesum sinni.

**Yvirskipaðu eru avgerandi fyri vakstrarmøguleikarnar**

Framleidni er betrað seinastu nógvu árini, m.a. stuðlað av politikkinum á fiski- og handilsvinnu økinum. Tað er umráðandi, at yvirskipaðu treytirnar framyvir tryggja framgongd í framleidninum. Ein smidligur arbeiðsmarknaður er ein umráðandi partur av hesum.

**Loysn fyri langtíðar avbjóðingum eigur ikki at verða útsett**

Fleiri eldri og færri yngri í arbeiðsførum aldri, avmarkar møguleikan at fíggja tað høga tænastustøðið, sum er bygt seinastu árini. Nú er umráðandi at raðfesta ábøtur, ið tryggja javnvágina millum útreiðslur og inntøkur í framtíðini.

INNIHALD

2 INNGANGUR OG SAMANUMTØKA

4 FØROYSKUR BÚSKAPUR ER TENGDUR AT ÚTFLUTNINGI AV FISKI

6 NÝTSLA HEVUR VERIÐ STUÐLAÐ AV GONGDINI Á ARBEIÐS-MARKNAÐINUM

8 BÆÐI HÚSARHALDINI OG VINNAN ERU VÆL BJÁLVAÐ

11 BÆÐI STUTT- OG LANGTÍÐAR AVBJÓÐINGAR FYRI ALMENNA FÍGGJARSTANDIN

# Inngangur og samanumtøka

Føroyski búskapurin hevur verið fyri stórari framgongd í nógv ár. Størri veiða og vaksandi prísur hava ført við sær høgar inntøkur í útflutningi, og hava økt inntøkurnar, so tær liggja á sama støðið sum í Danmark, sí mynd 1.

Góða búskaparliga menningin er vorðin stuðlað av einari munandi framgongd í framleidni. Bæði í alingini og uppsjóvarvinnuni[1] eru rættindini savnaði á færri virkjum og reiðaríðum, og tað hevur ført við sær, at vinnugreinarnar loysa seg betur.[2]

Fyritøkurnar og húsarhaldini í Føroyum hava nýtt framgongdina upp á at styrkja seg. Beint øvut støðuni í árunum upp ímóti fíggjarkreppuni, hava tey so statt verið væl bjálvaði at svara búskaparliga stoytinum aftur, sum í ár hevur rakt bæði føroyska og altjoða búskapin orsaka korona farsóttini.

Koronavirussið kom til Føroyar í mars. Kreppan á heilsuøkinum breiddi seg skjótt yvir á búskapin, har stokkut tiltøk í royndini at byrgja smittuni inni, líkt teimum donsku, skerdu búskaparliga virksemið. Føroyska strategiin við at byrgja smittuni inni hevur eydnast væl, og tí hevur ikki verið tørvur á varandi og harðari tiltøkum fyri at forða smittuspjaðingini, sí mynd 2.

**Bygnaðurin í vinnuni hevur stuðlað undir hákonjunkturin**
At koronavirussið breyt út hevur serliga rakt virkni hjá ferðavinnufyritøkunum meint. Tað sama ger seg galdandi í Føroyum. Ferðavinnan fyllir tó sera lítið. Fyri føroyska búskapin snýr tað seg hinvegin um fyritøkurnar, ið arbeiða við útflutningi av fiskavørum. Eftirspurningurin eftir fiski, og í høvuðsheitum matvørum, verður ikki eins nógv ávirkaður av konjunkturinum og nógvar aðrar vørur. Føroyski útflutningurin verður tí ikki ávirkaður eins nógv av sveiggjunum í altjóða búskapinum.

Atjóða afturstigið og óvissan um framtíðina hevur tálma prísinum á fiski. Alivirkini og fiskafyritøkurnar

**Stór vælferðarframgongd í Føroyum undir uppgongutíðunum** Mynd 1




Anm.: Leypandi prísir. BTÚ fyri 2019 í Føroyum er mett út fra Hagstovu Føroya og Búskaparráðnum.
Kelda: Danmarks Statistik, Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Smittuútbrotið í Føroyum varð skjótt avbyrgt** Mynd 2




Anm.: Smittutalið í Danmark verður fyrst víst frá 1 juli fyri at vísa á munin á teststrategium fyri fyrsta hálvár.
Kelda: Landslæknin, Hagstova Føroya, Statens Serum Institut, Danmarks Statistik og egnar útrokningar.

1 Uppsjóvarfiskur eru fiskasløg, ið ikki liva á havsins botni. T.d. makrelur og sild.

2 Eginpeningsavkastið í fiskivinnuni og alivinnuni er vaksið í uppgongutíðunum, samstundis sum talið av fyritøkum er minkað. Sí roknskaparhagtølini hjá Hagstovu Føroya.

hava tó nýtt verandi útgerðarkervi til at umstilla sølu teirra frá matstovukundum til smásølu. Samstundis hava fyritøkurnar verið eins fúsar at gera iløgur, sum skal síggjast í ljósinum av, at tær vóru væl bjálvaðar áðrenn koronavirussið breyt út. Tað hevur bjargað føroyska búskapinum.

Endurgjaldið, ið fyritøkur hava fingið, hevur eisini stuðlað búskapinum í ár. Serliga nakrir partar av búskapinum eru nógv umbidnir, og í byggivinnuni er lønarvøksturin á umleið 4 prosentum og tørvur er á arbeiðsmegi. Í septembur steðgaði endurgjaldið fyri lønarútreiðslur, og bæði arbeiðsfjøldin og arbeiðsloysi lá á umleið sama støðið sum áðrenn farsóttin fór at gera um eg, sí mynd 3. Hóast sveiggini í ár, er tað tí framvegis hákonjunkturur í Føroyum.

Altjóða felagsskapir vænta, at heimsbúskapurin nú er í einum altjóða lákonjunkturi, við eini ótryggari og drúgvari endurreisn fyri framman.[3] Tað ávirkar útlitini fyri einum lítlum og opnum búskapi sum tí føroyska. Hóast útflutningurin ikki ávirkast eins nógv av konjunkturinum, trýstir tann skerda keypsorkan á útflutningsvørum og økta óvissan prísin á fiskinum niður. Útflutningsfyritøkurnar mugu tí vænta eitt vet lægri inntøkur næstu árini, og føroyski búskapurin hevur helst nátt toppinum á hesum sinni.

**Fleiri eldri fólk veitir almenna fíggjarstandinum avbjóðingar**

Almenni fíggjarstandurin megnar at veita tær hægru útreiðslurnar í ár, sum hava verið við at tryggja búskapin. Skuldin hjá landsstýrinum er lítil, sæð í altóða høpi, og fíggingin av lønarendurgjaldinum gjøgnum arbeiðssloysisskipanina hevur verið við til at tálma útreiðslurnar hjá landskassanum í samband við korona farsóttina. Ein sunnur fíggjarstandur, ið setur pening til síðis í góðum tíðum, er treyt fyri at kunna føra ein støðugan fíggjarpolitikk.

Vaksandi talið av eldri fólki í Føroyum fer at vikna um haldføri á almenna fíggjarstandinum í framtíðini. Fyri at kunna varðveita tað høga tænastustøðið, ið er bygt yvir eitt áramál, noyðist landsstýrið at raðfesta trupulleikan ímeðan tíð er til tess. Møguleikin at krevja øðrvísi sløg av skatti vil t.d. hjálpa til at betra um haldførið.

**Arbeiðsloysið er enn sea lágt** Mynd 3




Kelda: Hagstova Føroya.

3 Den Internationale Valutafond, A Long and Difficult Ascent, *World Economic Outlook*, oktober 2020 *(leinki)*.

# Føroyskur búskapur er tengdur at útflutningi av fiski

Fiskiskapurin og alivinnan eru drívmegin í føroyskum búskapi, og útflutningurin av fiski telur yvir 95 prosent av øllum útflutningi. Ferðavinnan hevur havt stóra framgongd seinnu árini, men stendur enn einans fyri tveimum prosentum av BTÚ.[4] Føroyski búskapurin stendur tí mestsum á einum beini, og er øgiliga viðkvæmur fyri viðurskiftum, ið kunnu ávirka útboðið, sum t.d. veðrið og broytingar í fiskastovnunum[5]. Hóast tað, eru fyritøkurnar, ið arbeiða við útflutningi, nakað harðbalnar. Tað er fyrst av øllum, tí útflutningurin av fiski ikki verður so hart raktur av altjóða konjunktursveiggjum, sum eisini er vanligt fyri matvørur.[6]

Alivirkini, uppsjóvarflotin og botnfiskiskapurin kunnu harafturat, í ein ávísan mun, verða mettar sum serstøk øki. Tað merkir, at virknismenningin ikki neyðturviliga er eins á øllum fiskasløgum. Samstundis hava vinnugreinarnar víðka um teirra sølumøguleikar seinastu áratíggjuni, sum nú eru eyðkend av størri fjølbroytni bæði hvat viðvíkur landafrøði og vøruslagi. Føroyski búskapurin er tí mettur at vera sterkari í dag, enn hann var fyri 10-15 árum síðani.

### Útflutningurin av fiski hevur nátt toppinum á hesum sinni

Samanborið við í fjør, er virðið á útflutninginum minkað við 7 prosentum teir fyrstu 9 mánaðarnar í ár. Útflutningurin minkar orsaka av laksi og toski, sí mynd 4. Viðvíkjandi niðurgongdini í útflutninginum skal tó havast í huga, stóra framgongdin í 2019. Búskaparráðið í Føroyum metir, at í leypandi prísum vaks BTÚ 11 prosent í 2019[7], og tað var serliga orsaka útflutninginum av fiski.

**Niðurgongdin í útflutningsvirði í ár** Mynd 4

Prosent, jan-sep 2020 sammett við jan-sep 2019




Anm.: Útflutningsinntøkur í leypandi prísum.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Niðurgongdin í útflutninginum vísir serliga, at óvissan á útflutningsmarknaðunum vaks týðiliga, tá koronovirussið breyt út og ávirkaði búskapin í vesturheiminum. Bráðfeingis viðurskifti høvdu tí við sær, at meir lá á goymslu, og hetta trýsti seinni prísirnar niður.

Útflutningsfyritøkurnar fluttu tó skjótt teirra avreiðing frá deildum, ið vóru hart raktar, til deildir í framgongd. Nógv søla er tí flutt frá matstovu og vistaveiting, til framleiðslu av viðgjørdum vørum til smásølu. Henda umleggingin her forða einari størri niðurgongd í mongdum, men avreiðingarvirði hevur tó verið lægri.

---

4 Ferðavinnan hevði ein samlaðan bruttovirðisvøkstur á 2,1 prosent í 2017. Sí Hagstova Føroya, Vitjandi ferðafólk, 2011 til 2018, Búskaparískoyti, mai 2019 *(leinki)*.

5 Sí kassa 2 í hjá Sune Malthe-Thagaard og Flora Nagy, Arbeiðsmarknaðurin týstir av lágum arbeiðsloysi, *Danmarks Nationalbank Analyse (Færøsk økonomi)*, nummar 22, novembur 2019 *(leinki)*.

6 Fyri at síggja, í hvussu stóran mun matvørur ávirkast av konjunktursveiggjum, sí "Stort fald i dansk eksport, men sammensætningen kan være en stødpude" í *Danmarks Nationalbank Economic Memo*, nummar 8, juni 2020, eftir Adrian Michael Bay Schmith og Helle Eis Christensen *(leinki)*.

7 Frá 2013 til 2018 er BTÚ í leypandi prísum í miðal vaksið við knappliga 6 prosentum árliga.

Niðurgongdin í inntøkunum av útflutningi vísir tí á, at fiskur er vorðin seldur fyri ein lægri prís. Samanborið við samlaðu heimssøluna, ið hevur havt eina niðurgongd á knappliga 11 prosent í virði, er niðurgongdin á 7 prosentum tó meir avmarkað. Altjóða lákonjunktururin fer tí væntandi at minka um keypiorkuna á útflutningsmarknaðunum framyvir, og soleiðis at tálma prisunum. Føroyskar fyritøkur njóta í løtuni ágóðan av at hava bjálva seg seinnu árini. Bæði eginpeningsavkasti og eginpeningsfíggingin er vaksin nógv í uppgongutíðunum, sí mynd 5, og samstundis er lánsveitingin vaksin seinni enn búskapurin sum heild.[8] Fyritøkurnar eru tískil væl bjálvaðar til at yvirliva, hóast lægri prísir.

**Fyritøkurnar hava bjálvað seg igjøgnum uppgongutíðirnar** Mynd 5




Anm.: Eginpeningsfíggingin vísir eginpeningin hjá ikke-finansielle fyritøkum sum partur av teirra samlaðu skuld. Eginpeningsavkastið vísir avkastið hjá fyritøkunum samanborið við henda eginpening.
Kelda: Hagstova Føroya og Det Systemiske Risikoråd, Krav til de færøske banker, Analyse, marts 2020.

### Yvirskipaðu treytirnar eru avgerandi fyri vakstrarmøguleikarnar

Tað hevur stóran týdning fyri búskapin, at yvirskipaðu treytirnar veita útflutningsfyritøkunum møguleika at náa eitt framleidni á eins høgum støði sum teirra altjóða kappingarneytar. Hetta kann m.a. gerast við góðari og støðugari atgongd til marknaðin, umframt við burðardyggum og savnaðum fiskiskapi.

Handilsvinnu- og fiskivinnuaftalur eru ein treyt fyri, at útflutningsfyritøkurnar kunnu røkka høgum inntøkum. Í einari tíð, har tað er alsamt meir trýst á alheimsgerðingini, gersts arbeiðið hjá landsstýrinum við handilsaftalum enn meiri umráðandi. Við tað, at Stórabretland fer úr ES, kemur enn eitt strandaland til tað fleirsíðaða samráðingarborðið. Tað økir um óvissuna fyri framtíðar avtalum, hóast landsstýrið fyribils hevur fingið eina avtalu í lag við Stórabretland, um at leingja núverandi treytir. Um tað gert møguligt at útvega nýggjar samhandilsavtalur við størri lond, fer tað at merkja, at føroyski búskapurin verður enn sterkari, tí møguleikarnir hjá útflutningsfyritøkunum at avreiða økjast.

Í januar samtykti løgtingið eina nýggja fiskivinnuskipan, sí kassa 1. Fiskivinnupolitikkurin eigur at styðja undir, at fiskiskapurin er úrtøkumikil við at stuðla umskifti av fiskikvotum og fiskirættindum, sum m.a. miðsavnar fiskiflotan.[9] Tað er umráðandi, at rentabiliteturin í eini tilfeingisvinnu sum fiskivinnuni stuðlar

**Nýggj fiskivinnulóggáva í Føroyum** Kassi 1

Løgtingið samtykti tann 21 desembur í 2019 eina nýggja fiskivinnulóggávu, sum varð sett í gildi um ársskiftið. Fiskivinnulóggávan fevnir m.a. um:

- Avtøka av uppisølu av kvotum, sum vóru 8-ára loyvi, og loyvini longd til 12 ár.
- Víðkan av møguleikanum fyri útlendskum ognarskapi frá 0 til 25 prosent av fiskivinnuni.
- Ynski um fulla umsetligheit í fiskivinnuni, ið merkir, at møguligt skal vera at keypa kvotir og loyvi.

Nýggja fiskivinnulóggávan fer væntandi at gev tð sama í skattinntøkum sum tey tvey undanfarnu árini, við at umeggja inntøkurnar frá uppisølunum til øktan skatt á veiðina.

Tað eru fleiri útjavningarpolittisk atlit í fiskivinnupolitikkinum. Frá einum samfelagsbúskaparligum sjónarhorni er tað umráðandi, at fiskiskapurin er lívfrøðisliga burðardyggur og hevur fleksibilitet og umsetligheit í fiskakvotum og -rættindum.

8 Sí Sune Malthe-Thagaard og Flora Nagy, Arbejdsmarkedet presset af meget lav ledighed, *Danmarks Nationalbank Analyse (Færøsk økonomi)*, nummar 22, novembur 2019 *(leinki)*.

9 Sí t.d. Thor Bjørndal og Gordon R. Munro, The Economics and Management of World Fisheries, *Oxford University Press*, 2012.

undir langskygdar og framleidnisstyrkjandi íløgum. Tað tryggjar, at natturliga tilfeingið verður nýtt á ein skynsaman hátt. Yvirkapasitetur í fiskivinnuni minkar um rentabilitetin í vinnuni, og skipanin eigur at forða fyri hesum.

**Ferðavinnan er hart rakt við óvissari framtíð**
Ímeðan framleiðslufyritøkurnar í stóran mun hava tarna fíggjarliga stoytinum, er ferðavinnan hart rakt av tiltøkum, sum skulu tálma smittuspjaðingini. Tað eru jú tiltøk, ið darva altjóða ferðingini.

Gistingarhús og líknandi hava verið fyri einari markantari niðurgongd av gistingum, og tað hevur havt við sær, at tær tilhoyrandi vinnurnar hava havt nógv minni at gera, sí mynd 6. Ábendingar eru um, at virksemið er vaksið meir enn gistingarnar. Tað kann vera tekin um, at vinnan hevur góðar vónir fyri framtíðini.

Niðurgongdin í gistingum rennur saman við økingini av seingjarplássum við m.a. tveimum nýggjum gistingarhúsum, sum eisini økir um vandan fyri tapi hjá ferðavinnuni. Útlitini fyri ferðavinnuna er óviss, og er í ein stóran mun tengd at, hvussu gongdin við farsóttini verður.

Hóast ferðavinnan fevnir um ein avmarkaðan part av føroyska búskapinum, stendst týdningarmikil avleidd ávirkan av henni. Ferðavinann økir m.a. um flølbroytni í føroyska búskapinum, so oyggjarnar ikki eru eins tengdar at fiskaútflutningi, og í framtíðini kann hon eisini geva inntøkur og arbeiði í útjaðaranum.

**Stór niðurgongd í ferðavinnuni leggur trýst á hotell- og matstovuvinnuna** Mynd 6




Anm.: Báðar seriur eru 3 mánaðar glíðandi miðaltal.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Stórur umsetningur hjá smásølubúðunum í fyrru helvt av 2020** Mynd 7




Anm.: Myndin vísir smásøluumsetning í veruligum prísum .
Kelda: Hagstova Føroya.

## Nýtsla hevur verið stuðlað av gongdini á arbeiðsmarknaðinum

Eftirspurningur innanlands hevur í ár hjálpt til at stuðlað undir búskapin. Nýtslan hjá húsarhaldunum hevur verið hægri enn vanligt, og har skal m.a. havast í huga skerjingin í ferðing, og at fólk hava hildið frí heima. Umsetningurin av matvørum og ymsum tilfari til innbúgv var hvør sær knappliga 13 prosent hægri í øðrum kvartali, samanborið við í fjør, sí mynd 7.

Tann høga nýtslan innanlands er m.a. ein avleiðing av, at Føroyar hava eina effektiva strategi til at tálma smittuspjaðingini. Bara síðani fyrsta juli eru fleiri enn 165.000 kanningar gjørdar, sum svarar til 3 ferðir fólkatalið í landinum. Stóri testkapasiteturin, sum ser-

liga verður nýttur við landamørkini, hevur lættað um smittusporingina. Burtursæð frá almennu tilmælunum um reinføri, eru ongar avmarkingar ásettar vinnulívinum í løtuni.

Tær endurgjaldsskipanir, sum komu eftir koronafarsóttin breyt út, hava stuðlað undir nýtsluna, sí kassa 2. Skipanin fyri lønarískoyti til niðursetta arbeiðstíð hevur hjálpt við at avmarka inntøkuminking. Tað hevur hildið hondini undir húsarhaldunum, sum samstundis hava brúkt eins nógvar pengar sum áður.

Stóra nýtslan førir við sær øktan innflutning, tí góð 20 prosent av nýtsluni hjá húsarhaldunum verður innflutt úr útlandinum. Innflutningurin av bilum minkaði tó markant í vár, og har er tapið ikki vunnið inn aftur. Orsøkin til tað er, at innflutningurin av bilum er serliga knýttur at ferðavinnuni, ið nýtir bilarnar til útleigan.

## Skjót umstilling á arbeiðsmarknaðinum

Skipanin fyri lønarískoyti til niðursetta arbeiðstíð varð dúgliga nýtt. Tá tað var tað mesta, vóru fleiri enn 4.000 fólk í skipanini, sum svarar til umleið 15 prosent av arbeiðsmegini. Tað hevur verið við til at avmarka vinnumissin í tænastuvinnuni við stokkutari afturgongd í umsetninginum.

Hóast endurgjaldsskipanir vaks arbeiðsloysi kortini við 1650 persónum í apríl. Arbeiðsloysi var størst í hotel- og matstovuvinnuni og í flutningsvinnuni. Í juli var arbeiðsloysi tó líka lágt sum í fjør. Býtið er tó broytt. Hotel- og matstovuvinnan hava enn minni at gera enn í mars, og arbeiðið er vaksið í handilsvinnuni, sí mynd 8. Menningin vísir ein fleksibilitet í tí føroyska arbeiðsmarknaðinum. Har líkindini eru fyri, at arbeiðsmegin í summum størvum framhaldandi fer at minka, flytur hon seg til vinnugreinar við framgongd.

## Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur ein innbygdan stoytdoyvara

Stutta arbeiðsniðurgongdin í vár hevði í við sær, at fleiri fólk gjørdust arbeiðsleys, men at arbeiðstíttleikin minkaði. Orsøkin til tað er, at ein lutfalsliga stórur partur av teimum, sum mistu arbeiði, vóru ungir og gamlir føroyingar ella fólk við øðrum etniskum uppruna. Vanliga hava hesi meir lyndi til at detta úr arbeiðsfjøldini.

Føroyski arbeiðmarknaðurin er soleiðis, at arbeiðsmegin er ógvliga ávirkað av konjunkturinum. Føroyingar við førleikum innan byggivinnuna og farmaflutningi eru eftirspurdir í útlondum, og tað

### Hjálparpakkar til húsarhald og fyritøkur í trongstøðu

Kassi 2

Í vár samtykti landsstýrið eina røð av hjálparpakkum til húsarhaldini og vinnuna, orsaka ta búskaparligu óvissuni, ið kom, tá koronovirussið breyt út.

**Hjálparpakki 1**
Umfatandi endurgjald av lønum vegna sjúku til fyritøkurnar, umframt at innlating og rindan av MVG fyri fyrsta ársfjórðing varð útsett í tríggjar mánaðar. Harumframt var eitt lønarískoyti á í mesta lagi 20.000 krónur um mánaðan fyri tey, ið arbeiddi niðursetta tíð, og eitt ískoyti til sjálvstøðug vinnurekandi.

**Hjálparpakki 2**
Umfatandi ískoyti til fyritøkur í trongstøðu, sum høvdu niðurgongd í inntøkum vegna koronofarsóttin. Skipanin fyri ískoyti til niðursetta arbeiðstíð (í hjálparpakka 1) varð víðkað til eisini at fevna um arbeiðandi pensionistar.

**Hjálparpakki 3**
Umfatandi málrættaður stuðul til ferðavinnuna (hotell, ferðaskrivstovur, flutning, matstovur, upplivingar o.a) og mentanarøkið, sum fingu endurgjld fyri partar av føstu útreiðslunum. Harumframt setti Framtaksgrunnur Føroya 30 milliónir krónur til taks sum váðafúsur kapitalur hjá ferðavinnuni í 2020 og 2021.

### Arbeiðsfjøldin hevur umstillað seg skjótt

Mynd 8




Anm.: Fiskiskapur og fiskaaling fevna um fiskavirksemi .
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

hevur stuðlað undir fleksibilitetin á arbeiðsmegini.[10] Broytingar í arbeiðsfjøldini í Føroyum vísa eisini, at tey gomlu og ungu í Føroyum hava meir lyndi til at fara inn og út av arbeiðsmarknaðinum, enn í nógvum øðrum londum.

Útlendsk arbeiðsmegi hevur eisini við sær, at arbeiðsfjøldin veksur í uppgongutíðum og minkar, tá sveiggini venda. Tað er serliga galdandi fyri ófaklærdu arbeiðsmegina, sum er við til skapa ein stoytdoyvara á arbeiðsmarnaðinum. n nuværende lovgivning giver skattefordele ved at arbejde i udlandet, hvilket virker forvridende. En reduktion af disse skattefordele vil øge både det strukturelle arbejdsudbud og skatteindtægterne på Færøerne.

Í heila tikið hevur innanhýsis modibiliteturin á føroyska arbeiðsmarknaðinum verið góður. Gongdin seinastu 20 árini hevur verið, at arbeiðsorkan í fiskivinnuni er minkað. Tað hevur havt við sær, at ein stórur partur av arbeiðsfjøldini hevur noyðst at farið í aðrar vinnur, t.d. almenna ella privata tænastuvinnu. Samstundis sum útflutningsfyritøkurnar hava framgongd í teirra framleidini, fer henda menningin væntandi at halda á í fiskivinnuni og førka seg inn á alivinnuna. Tað er umráðandi, at stuðla uppundir ta neyðugu og framhaldandi umstillingina á arbeiðsmarknaðinum, t.d. við møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Trýst á arbeiðsmarknaðinum hóast lægri vøkstur**
Lága arbeiðsloysið, sum í heila tikið hevur verið óávirkað seinasta hálva árið, gevur eina ábending um, at arbeiðsmarknaðurin er undir trýsti. Møguleikin fyri trot á arbeiðsmegi er til staðar, og tað kann økja um vandan fyri, at búskapurin verður ovhitaður. Burtursæð frá í teimum hart raktu vinnugreinunum sum gistingarhúsum og matstovum, hava lønirnar jú heldur ikki verið markant ávirkaðar av, at Føroyar fóru niður í ferð í vár, sí mynd 9.

Serliga byggivinnan, har lønirnar eru nógv hækkaðar seinnu árini, og har tørvur er á arbeiðsmegi, eru tekin um arbeiðsmarnaðurin er sperdur. Arbeiðsloysið er lágt, lønirnar høgar og tørvurin er arbeiðsmegi hevur verið stórur í langa tíð.

**Framhaldandi góð lønarhækkan** Mynd 9




Anm.: Lønarvøksturin er roknaður út frá einum implisittum lønarindeksi, grundað á lønargjaldingar og talið av lønmóttakarum. Fiskivinnan er ikki tikin við, tí lønirnar í fiskivinnuni eru tætt knýttar at intøkuni umborð á skipunum. Lønargjaldið í fiskivinnuni hevur tí eitt slag av avlopsbýti, sum ikki gevur eina rætta mynd av tí generella lønartrýstinum í Føroyum, sum er vegna t.d. vantandi arbeiðsmegi. Tølini fyri 2020 eru grundað á gongdina frá januar til oktobur.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Útlendska arbeiðsmegin er ein týdningarmikil liður á føroyska arbeiðsmarknaðinum og tískil í føroyska búskapinum. Tí er tað umráðandi fyri búskapin, at føroysku fyritøkurnar hava nóg góðan møguleika eisini at útvega sær útlendska arbeiðsmegi frá londum, ið eru uttan fyri ES. Tað er serliga galdandi, tá partar av búskapinum er í vanda fyri ovhitan, sum enn er støðan í byggivinnuni.

## Bæði húsarhaldini og vinnan eru væl bjálvað

Búskaparliga framgongdin síðani 2013 hevur ført við sær, at lønirnar í húsarhaldunum eru hækkaðar markant, og føroyingar hava fingið meir frælsi í teirra privatu fíggjarligu viðurskiftum. Talið av fólki, ið meta seg vera før fyri at spara pening saman, er vaksið við 20 prosentum í uppgongutíðunum til 75 prosent.[11]

10 Tann núverand lóggávan veitir skattafyrimunir við at arbeiða uttanlands, sum eru avskeplandi. Ein redusering av hesum skattafyrimununum fer at økja bæði tað strukturella arbeiðsútboðið og skattaintøkurnar í Føroyum.

11 Si Hagstovu Føroya konjunkturbarometer fyri húsarhald.

Tað sæst eisini hjá bankunum, har húsarhaldini hava økt innlánini meir enn útlánini í uppgongutíðunum, sí mynd 10.

Meginparturin av ognunum hjá føroysku húsarhaldunum eru knýttar at bústøðunum, og tí er bústaðarmarknaðurin høvuðsvansin fyri húsarhaldini. Føroysku húsarhaldini fevna um ein góðan helming av samlaða útláninum hjá føroysku bankunum, og tað er í høvuðsheitum til bústaðarfígging.

Lántøkan hjá húsarhaldunum er vaksin yvir 20 prosent síðani byrjanina av 2014, og lánini fara í høvuðsheitum enn til at fíggja ymiskt sethúsavirksemi. Lántøkan frá donksum reallánsstovnum, ið fevnir um umleið 30 prosent av samlaða bústaðarfíggingini í Føroyum, er harafturat vaksin við yvir 17 prosentum í sama tíðarskeiði. Kredittvøksturin hevur tó verið avmarkaður, um hugsað verður um framgongdina í inntøkum og vaksandi sethúsaprísirnir.

**Framvegis framgongd á sethúsamarknaðinum**
Sethúsaprísurin í Føroyum er vaksin nógv seinnu árini. Hækkingin er komin av m.a. lágari rentu, hægri inntøkum og tilflytan orsaka góðu tíðirnar. Í ár hevur gongdin á prísinum verið tann sama, tó í einum vet lægri tempo, sí mynd 11.[12]

Tann meir hóvligi prísvøksturin á serliga húsum í høvuðsstaðarøkinum kann m.a. standast av, at høgi prísirnir nú hava fingið nøkur húsarhald at flyta út á bygd. Harumframt kann tað vera, at byggivirksemið í Tórshavn seinnu árini hevur nøktað nakað av eftirspurninginum, sum so eisini tálmar prísvøkstrinum.

Samstundis fer Eysturoyartunnilin væntandi at minka nógv um tíðina, tað fer at taka at ferðast millum Havnina og suðurendan av Eysturoynni.[13] Tað hevur gjørt tað meir freistandi at búseta seg í teimum størru bygdunum á Skálafjørðinum, og tað stuðlar eisini undir prísvøksturin her.

**Avmarkað ávirkan av koronafarsóttini hjá teimum føroysku bankunum**
Eginpeningsavkastið hjá teimum 4 føroysku bankunum minkaði ógvusliga fyrsta ársfjórðingin í 2020, sí mynd 12. Óvissan um avleiðingarnar av farsóttini

**Innlánið hjá føroyskum kundum vaksa** Mynd 10




Anm.: Inn- og útlánini hjá føroyskum kundum í føroyskum bankum.
Kelda: Dátufelagsskapur við Fíggjareftirlitinum (MFI-hagtølini).

**Húsaprísirnir eru enn vaksandi** Mynd 11




Anm.: 2020 fevnir bert um leypandi keypini í árinum. Serliga eru prísirnir í triðja og fjórða ársfjórðingi merktir av óvissu. Sethús í restini av landinum er eitt miðal fyri indeksið fyri stórar býir og lítlar býir, undantikið Sandoy og Suðuroy.
Kelda: Hagstova Føroya og BankNordik.

12 Talan er um metingar, her eru stórar óvissur.

13 Landsbanki Føroya, Fíggjarligt Støðufesti 2018 *(leinki)*, 2018.

var stór, og tað hevði við sær stóra afturgongd á fíggjarmarknaðinum. Bankarnir vórðu tí raktir av afturgongd í gjaldoyrastillingum, og bókaðu samstundis hægri niðurskrivingar, gjørdar eftir metingum frá leiðsluni.

Serliga hotell- og matstovuvinnan varð rakt. Hesar vinnurnar fevndu tískil eisini um ein stóran part av niðurskrivingunum hjá bankunum fyrsta ársfjórðingin, sum taldi 32 milliónir krónur, ella 0,1 posent av samlaða útláninum hjá føroysku bankunum.[14]

Í øðrum ársfjórðingi eru tapini, ið kunnu knýtast til korona, ikki komin eins nógv til sjónda hjá bankunum, sum m.a. kemst av, at kundarnir hjá bankunum vóru væl bjálvaðir eftir eitt áramál við búskaparligum framburði. Tí hevur tað í minni mun verið tørvur á fleiri avsetingum. Fíggjarmarknaðarnir hava haraftrat rættað seg eftir ógvuligu niðurgongdina í mars og apríl. Hóast bankarnir væntа eitt verri úrslit í ár sammett við árið í fjør, eru útlitini fyri árið sum heild tí betri enn bankarnir sjálvir mettu í byrjanini av øðrum ársfjórðingi.

### Bjálvingin hjá bankunum vaks til Føroyar fóru niður í ferð í vár

Søguliga hava tað verið stór sveiggj í føroyska búskapinum, og føroyskir bankar hava havt størri niðurskrivingar og tab enn teir donsku bankarnir, serliga upp á vinnukundar.[15] Ein um bankarnir hava nóg nógvan kapitalyvirdekkning, t.e., at nóg mikið av luft er millum kapitalkrøvini til stovnarnar og teirra veruligu kapitalprosent, kann tað fyribyrgja, at tap í bankasektorinum økja um møgulig sveiggj í realbúskapinum.

Frá endanum av 2016 og til mitt í 2019, høvdu føroysku bankarnir eina niðurgongd upp á í miðal 2,7 prosentstig í kapitalyvirdekkningi, sí mynd 13. Tað hendi samstundis sum lánsveitingin vaks og kapitalkrøvini hjá bankunum hækkaðu.[16] Gongdin vendi í seinna hálvári í 2019, tá kapitalyvirdekkningurin hjá bankunum aftur fór at vaksa. Tað skal setast í samband við, at bankarnir fyrireikaðu seg til øktu kapital-

**Stór sveiggj í eginpeningsavkastinum hjá bankunum** Mynd 12




Kelda: Dátufelagsskapur við Fíggjareftirlitinum.

**Kapitalyvirdekkningurin hjá bankunum er vaksin seinasta árið** Mynd 13




Anm.: Kapitalyvirdekkningurin hjá bankunum uppgjørdur í muninum millum teirra veruliga kjarnukapital og krøvini til teirra veruliga kjarnukapital, mált sum partur av teirra váðafúsu ognum. Samlaði kapitalyvirdekkningurin hjá teimum 4 stovnunum er eitt mett miðaltal av kapitalyvirdekkninginum hjá hvørjum einstøkum banka.
Kelda: Dátufelagsskapur við Fíggjareftirlitinum umframt egnar útrokningar.

14 Fevnir bæði um útlán og veðhald, umframt niðurskrivingar á eksponeringarnar hjá bankunum uttan fyri Føroyar.

15 Det Systemiske Risikoråd, Krav til de færøske banker, Analyse, mars 2020 *(leinki)*.

16 Tann systemiski buffarin varð hækkaður, og kapitalvarðveitingarbuffarin varð indfasaður.

krøvini. Í vár bleiv tann generelli systemiski buffarin tó fyribils slakaður frá trimum til tvey prosent, sí kassa 3. Samstundis steðgaði kredittvøksturin upp. Samlað hevur tað ført við sær, at kapitalyvirdekkningurin hjá bankunum er hækkaður enn meir. Samanumtikið vóru teir føroysku bankarnir væl bjálvaðir, tá korona farsóttin rakti samfelagið.

Markantar niðurskrivingar kunnu tó møguliga minkað kapitalyvirdekkningin hjá bankunum, sí mynd 14. Um bankarnir, samstundis sum teir gera niðurskrivingar, eisini t.d. hava ógvusliga niðurgongd í inntøkum, er vandi fyri, at yvirdekkningurin hjá onkrum stovnum hvørvur heilt.

## Bæði stutt- og langtíðar avbjóðingar fyri almenna fíggjarstandin

Skuldin hjá tí almenna er lág í løtuni, og landskassin hevur tí verið førur fyri at styðja undir búskapin eftir smeitin í vár. Færri inntøkur frá skrásetingargjaldi og ógvuliga fallið í oljuprísinum í vár, varð bert partvíst loftað av øktu meirvirðisskattingini av størri nýtsluni hjá føroyingum, og frítíðini, ið teir hildu heima. Inntøkurnar hjá landskassanum verða tí minni enn væntað í ár.

Samstundis eru útreiðslurnar hækkaðar, men munandi minni samanborið við nógv onnur lond í heiminum. Koronafarsóttin hevur einsamøll økt útreiðslurnar knappliga 1 prosent av BTÚ. Tað er m.a. tí, at skipanin til lønarískoyti fyri niðursetta arbeiðstíð til og við juni mánaða, varð fíggjað av eginpeninginum hjá Arbeiðsloysisskipanini, sum svarar til 0,5 prosent av BTÚ.

Fíggjarmálaráðið væntar, at undirskotið hjá landskassanum verður 500 milliónir krónur í ár.[17] Stóra undirskotið í ár kemst m.a. av, at Atlantic Airways og Vága Floghavn fingu ein serstakan peningastuðul á 115 milliónir krónur. Undirskotið kemur eftir nøkur ár við lítlum yvirskoti á almennu salduni, sí mynd 15.

Fyri at tryggja likviditetin hjá landskassanum, tók Landsbanki Føroya í juni eitt lán á 1,6 milliard krónur.

### Seinasta gongdin í fíggjarligu stýringini í Føroyum

Kassi 3

- **Broytingar í krøvunum fyri SIFI-tilnevning í Føroyum, sum væntandi verður sett í gildi í byrjanina av í 2021.** Væntandi verður eitt lægra mark sett, fyri nær ein peningastovnur kann sigast at hava systemiskan týdning. Sum avleiðing av tí, missur Norðoya Sparikassi, sum er triðstørsti banki, sín sess. Hetta verður galdandi frá næstu SIFI-tilnevning í Føroyum, sum verður í juni 2021. Uppskot um at broyta treytirnar, verða í løtuni viðgjørdar í løgtinginum.

- **Generelli systemiski buffarin í Føroyum varð fyribils skerdur fra trimum prosentum til tvey prosent 19 mars í 2020.** Tað Systemiska Váðaráðið hevur boðað frá, at buffarin í fyrsta lag verður hækkaður aftur upp á 3 prosent í 2021. Harumframt hevur Ráðið avgjørt at hava eina ávaringartíð á 12 mánaðar, frá at satsturin til buffarin broytist, til broytingin verður sett í gildi.

- **Fíggjareftirlitið longdi innfasingina av krøvum til skuldir, ið vóru skikkaðar til niðurskriving (NEP)** fyri føroyskar stovnar við einum hálvum ári, orsaka av negativu ávirkanini koronafarsóttin hevði á inntøkurnar hjá stovninum. Higartil skuldi krøvini formliga verið lokin fyrsta januar í 2025. Nú er tað so broytt til fyrsta juli í 2025.

### Økt tal av niðurskrivingum minka um kapitalyvirdekkningin hjá bankunum

Mynd 14




Anm.: Myndin vísir úrslitið, tey ymsu scenariuni hava fyri kapitalyvirdekkningin hjá bankunum. Scenariuni eru grundað á prosentini á niðurskrivingunum hjá hvørjum einstøkum stovni fyri árini 2009 til 2019. T.d. vísir "Maks-scenariið" úrslitið av samlaða miðalyvirdekkninginum hjá bankunum í dag, um hvør einstakur stovnur samstundis varð raktur av sínum størsta niðurskrivingsprosenti í tíðarskeiðinum frá 2000 til 2019.

Kelda: Dátufelagsskapur við Fíggjareftirlitinum umframt egnar útrokningar.

17 Undirskotið hjá landskassanum fevnir ikki um útreiðslur hjá teimum almennu partafeløgunum, sum varða av útbygnaðinum og rakstrinum af pørtum av undirstøðukervinum.

Almenna skuldin er tí vaksin frá 41 prosentum av BTÚ við byrjanini av árinum til 48 prosent av BTÚ.[18] Skuldin er enn lítil, um hugt verður í altjóða høpi, og rentan á nýggju skuldini er lág.

**Umráðandi, at fíggjarpolitikkurin stabiliserar konjunktursveiggini**

Søguliga hava stór sveiggj verið í føroyska búskapinum. Tað setur stór krøv til fíggjarpolitikkin, so at spart verður í góðum tíðum, fyri at kunna styðja undir búskapin og inntøkurnar í ringum tíðum.

Fíggjarpolitikkurin hevur tó í uppgongutíðunum í stóran mun fylgt við konjunkturinum,[19] og búskapurin er enn í einum hákonjunkturi. Landsstýrið átti tí ikki at økt um útreiðslurnar júst nú, men heldur at styrkja fíggjarstøðu sína, tá bráfeingis útreiðslurnar eru púra horvnar.

**Loysnirnar fyri langtíðaravbjóðingum átti ikki at verið útsettar**

Fólkasamansetingin í Føroyum fer væntandi at broytast komandi árini. Fyrst av øllum, vera tað fleiri gomul at forsyrgja, sí mynd 16. Tað er ein avbjóðing fyri stórt sæð allar búskapirnir í vesturheiminum.

Undir stóru fíggjarkreppuni í 1990unum og í byrjanini av 2010'unum, var stór fráflyting úr Føroyum. Tað varð bert partvíst loftað av tilflyting í teimum fylgjandi hákonjunkturunum. Um ein tílík nettofráflyting stendur við yvir langa tíð, gert haldføri hjá almenna fíggjarstandinum verri, tí talið av fólki í arbeiðsførum aldri minkar, sum so førir við sær færri skattainntøkur.

Undir núverandi uppgongutíðum hevur tiflytanin hinvegin verið ógvuliga stór. Lívskorini í Føroyum eru í dag betri enn tey vóru í 1990unum, og tí er ikki víst, at fraflytingin verður serliga stór, tá pílarnir fara at peika niðureftir. Tað vísir, at tað valdar stór óvissa um fortreytirnar fyri langtíðar haldføri hjá tí almenna fíggjarstandinum.

Óvissan um útrokningarnar av haldførinum hjá tí almenna fíggjarstandinum merkir tí ikki, at hond

**Undirskot á almennu upphæddini í ár**

Mynd 15




Anm.: Myndin vísir rakstrar-, anleggs- og útlánsupphæddina, DAU-upphæddina. "Landsstýrið" fevnir bæði um DAU-upphæddina hjá landskassanum í samband við fíggjarlógina, umframt útreiðslur í samband við almenn partafeløg, sum taka sær av útbyggingini og rakstrinum av pørtum av undirstøðukervinum. Fyri 2020 er undirskotið tí 1.100 milliónir krónur, har 600 eru frá almennum partafeløgum.
Kelda: Landsbanki Føroya og egnar útrokningar.

**Fleiri gomul og færri í arbeiðsførum aldri í framtíðini**

Mynd 16




Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

18 Tað er enn einki brúkt av einum parti av likdivitetinum frá teimum 1,6 milliardum krónunum, og Landsbanki Føroya væntar at rinda ein part af upptiknu skuldini í juni í 2021.

19 Sí Sune Malthe-Thagaard og Flora Nagy, Arbejdsmarkedet presset af meget lav ledighed, *Danmarks Nationalbank Analyse (Færøsk økonomi)*, nummar 22, novembur 2019 *(leinki)*.

ikki skal takast um avbjóðingarnar. Rættstundisligar broytingar av t.d. skattaskipanini kann tryggja langtíðar haldførinum og geva ein sterkari føroyskan búskap.

Møguleikin at krevja inn øðrvísi sløg av skatti, kann betra um nakrar av avbjóðingunum við haldføri. Ognarskattur á bústaðir, ið fólk ikki búgva fast í, hevði t.d. økt inntøurnar. Ognarskattur grundaður á gongdina í sethúsaprísinum verður umframt ein sjálvvirkin stabilisatorur fyri bæði realbúskapin og fíggjarliga geiran, og er sum heild minni ójavnbýttur enn nógvir aðrir skattir.

Harumframt verður ein stórur partur av inntøkunum í Føroyum skaptur við, at fyritøkur gera sær dælt av tí náttúrliga hav- og fiskatilfeinginum runt um Føroyar. Tað, sum er eftir av yvirskotinum hjá fiskivinnuni, tá útreiðslurnar[20] og eitt vanligt avkast til íløgur og eginpening er avroknað, kallast tilfeingisgjald. Hóast útrokningarnar av tilfeingisrentuni eru tengdar av stórari óvissu, eigur landsstýrið leypandi at meta um skattamøguleikarnar, so at avkastið frá tí náttúrliga tilfeinginum í Føroyum fellur einum størri parti av fólkinum í lut.[21] Í løtuni verður fiskatilfeingið helst ikki skattað nóg høgt.[22]

Landsstýrið kann harafturat bøta um bygnaðarligu almennu salduni, við at spara í teimum útreiðslum, sum ikki eru at rokna sum tænasta til borgaran. Ein líðandi minking av rentustuðlinum á 35 prosent vil t.d. hjálpa til við hesum.[23]

20 Veiðikostnaður fevnir um manningarlønir.

21 Sí t.d. Gregor Schhwerhoff, Ottmar Edenhofer og Marc Fleurbaey, Taxation of Economic Rents, *Journal of Economic Surveys*, 2019 *(leinki)*.

22 Sí t.d. Búskaparráðið, Búskaparfrágreiðing várið, 2020 *(leinki)*.

23 Sí kassa 3 í Sune Malthe-Thagaard og Flora Nagy, Arbejdsmarkedet presset af meget lav ledighed, *Danmarks Nationalbank Analyse (Færøsk økonomi)*, nummar 22, novembur 2019 *(leinki)*.

## UM GREININGINA

Sum ein avleiðing av leiklutinum hjá tjóðbankanum í samfelagnum verða greiningar um búskaparlig og fíggjarlig viðurskifti gjørdar.

Greiningarnar verða givnar út leypandi og fevna m.a. um metingar av aktuellu konjunkturstøðuni og tí fíggjarliga støðufestinum.

Greiningin er sett saman av einari danskari, enskari og føroyskari útgávu. Um ivi er um neyvleikan í týðingini, er tann danska útgávan galdandi.

DANMARKS NATIONALBANK
LANGELINIE ALLÉ 47
2100 KØBENHAVN Ø
WWW.NATIONALBANKEN.DK

Ritstjórnin er liðug
1. desembur 2020

**Flora Nagy**
Senior Bank Analyst
*fna@nationalbanken.dk*
FINANSIEL STABILITET

**Adrian Michael Bay Schmith**
Economist
*ambs@nationalbanken.dk*
ØKONOMI OG PENGEPOLITIK

KONTAKT

**Ole Mikkelsen**
Kommunikations-
og presserådgiver
*omi@nationalbanken.dk*
*+45 3363 6027*
SEKRETARIAT
OG KOMMUNIKATION